VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Eitt lagnuval

Tað er eitt lítið tespiligt upptak, sum Obama, forseti, hevur arvað eftir George W. Bush. Ein partur av hesum arvi er kríggið í Afghanistan. Í dag skal so Afghanistan til demokratiska próvtøku fyri aðru ferð síðan NATO innrásina, ið rak Taliban frá valdinum og valið er tí lagnuval Afghanistans.
Endamálið við innrásini var at útrudda Al Qaida reiðrini í Aghanistan og fáa sameinda Al Qaidas, Taliban, frá valdinum og stovna fólkaræði eftir vesturlendskari fyrimynd. Innrásin var eitt av mongum dømum um ein politikk, sum Bush mestsum var besettur av, nevnliga at broyta politisku skipaninar í londum, har USA hevði búskaparlig áhugamál ella har Bush fyrisitingin helt seg vita, at yvirgangslið høvdu friðskjól og frítt at fara.

Nú er valla nakar ivi um, at harðrenda og kúgandi Talibanstýrið var Al Qaide vinarliga sinnað og at Al Qiada hevði frítt at fara í Aghanistan undir Talibanstýrinum. Hinvegin eru alt fleiri, ið seta spurnartekin um, innrásin var rætta tólið til tess at basa altjóða yvirgangi. Søga Afghanistans er ein long søga um stórveldi, ið hava roynt at leggja hetta stóra, ríka men sera trupla og óróliga land undir seg. Seinastu royndina átti Sovjet, sum var, og endaði henda royndi við einari katastrofu fyri sovjetiska herin og viðhaldsfólk Sovjets í landinum.

Vit skulu vara okkum fyri at spáa undirgang og katastrofu fyri NATO verkætlanina í Afghanistan. Hinvegin eru flestallir altjóða eygleiðarar samdir um, at landið er langt frá tí fólkaræðiligu skipan, sum Bush og Blair droymdu um, tá ið teir fingu NATO við til innrásina. Afghanistan er eyðkent av átrúnaðarligum og fundamentalistiskum valdsbólkum, av krígsharrum, av ættarbólkum, klanum og aldargomlum klanstríðum og stóru munur er á teimum ymsku landspørtunum. Støðan er vánalig og trygdin er út av lagi.

Karzai stjórnin, ið fær stuðul USA og NATO, hevur bert valdið í høvuðstaðnum, teimum stóru býunum og í norðaru pørtunum av landinum. Á landsbygd, í villingarsomu fjøllunum og í ávísum landspørtum hava Taliban ella krígsharrar ræðið og terrorisera vanliga fólkið. India ger sær dælt av støðuni og Pakistan er lítið annað enn lunkaður sameindur hja NATO – ein sameindur, hvørs fyrisiting og almenna lív yvirhøvur er djúpt samantvinnað við Taliban. Tað er júst avdúkað, at henda smantvinnan er álvarsom, at stórur partur av fíggjarliga stuðlinum til pakistansku stjórnina, milliardir nav dollars, fer beinleiðsi til at fíggja bardagan hjá Taliban móti NATO í Afghanistan og móti vesturheiminum sum heild.

Talibanar standa hernaðarliga so sterkir í dagsins Afghanistan, at stórur vandi er fyri, at teir kunnu ræða partar av veljarafjøldini, serstakliga kvinnurnar, frá at atkvøða í dag. Vanligi afghanski veljarin, ið ikki ynskir Talibanarnar aftur til ræðið, torir illa á val av ótta fyri trygdini ella fyri hevnd Talibans. Valið í dag er tí eitt lagnuval ikki bert fyri vesturlendskt sinnaðu stjórnina í Kabul men fyri alla USA/NATO verkætlanina í Afghanistan. Útlitini eru døpur, men ein hevur sjálvsagt loyvi at vóna, at døpru spádómarnir ikki fara at ganga út.

Sosialurin

Her má vend koma í…!

SIGFRÍÐUR OLSEN

Staddur á Sjúklingahotellinum í Keypmannahavn settist eg at kaga í føroysku bløðini, ið har vóru komin. Kom fram á politiska viðmerking, ið Hanus Kamban hevði skrivað, nevnd: Tann føroyski Auken. Liðugur at lesa nevndu grein, hevði eg bestan hug at leypa upp úr sofuni, langa nevan í borðið og rópa: ENDILIGA!! - Men í støðuni, eg var í, kundi eg einki av hesum.

Greinin endurkveikti mangt í mær, og fari eg í fyrstu syftu at senda Hanusi eina hjartans tøkk fyri, at hann á hendan sera siðiliga og virðiliga hátt loysti frá posabandinum og fari hervið at loyva mær at koma við nøkrum viðmerkingum og onkrum íkasti.

Grein Hanusar endar við: Hvør skal kunna blása lív í eitt lík? -

Skilji so sera væl, at Hanus, eins og onnur javnaðarfólk, er dapurskygdur. Haldi tó, at hendan politiska viðmerking hansara ber boð um, at kring um í landinum, niðri á lágu gøtunum, har floksfelagar hittast at samrøða, har livir javnaðarhugsjónin framvegis. Men vit kunna uttan himpr vera samd við Hanusi um, at á ovastu rók er illa statt: Um ikki deyð - so í álvarsligum andaleypi! Havi tó eina kenslu av, at viðmerking Hanusar fer at kveikja - fer at verða viðvirkandi til, at lív aftur kemur í.

Tann stutta, men vakra og sigandi lýsingin av fremsta undangongumanni okkara, er so sera hugvekjandi og góð. Mikli hugsjónarmaðurin, sum tjóðveldis- og fólkafloksmenn elskaðu at hata. Men fattur stóð hann og fastur, sum klettur í stormi og ódn! Og grundstøðið var javnaðarhugsjónin.

Í greinini kemur Hanus fram til 8. november 1968. Petur Mohr Dam hevur sligið sítt síðsta slag fyri flokkin. Hann er farin - er ikki longur okkara millum. Men javnaðarhugsjónin livir víðari: Strembanin fyri einum betri og sámuligum lívi við javnbjóðis rættindum fyri allar føroyinga heldur áfram. J. Fr. Øregaard, Atli Dam og Marita Petersen taka við førninginum og bera hann víðari fram.

Í svárastu krepputíð í Føroya søgu er Marita Petersen formaður í flokki okkara og gerst løgmaður eftir Atla. Og virðing okkara fyri henni veksur dag frá degi. Vit javnaðarfólk taka saman lógvatak og vilja í verki vísa, at vit stuðla henni av fullum huga. Vit vita, at hon í hesum svára tíðarskeiði hevur so sera nógv brúk fyri okkara uppbakking og einum góðum, sterkum baklandi. Og tað eru ikki bert vit javnaðarfólk, ið stuðla og vísa henni virðing. Tí virðingin røkkur langt inn í okkara mótstøðuflokkar og út í samfelagið alt. Og aftur mega vit ásanna, at her stendur ein klettur í stormi og ódn.

Men nú hendir nakað, sum einki javnaðarhugsjónarfólk trúði kundi lata seg gera. Tí júst í hesum tíðarskeiði fær javnaðarhugsjónin og samhaldsfestið eitt sera álvarsligt skot fyri bógvin. Upp úr sæti reisist høgur, arrogantur harri, fullur av maktgirnd og fullkomuliga líkasælur fyri floksfeløgunum, men tó við væl tillagdari »charmu«.

Stuðul hansara til Maritu er, at hann bjóðar henni av til formann floksins. Marita vinnur tó valið, men týðuligt er, at kílar eru settir í. Ivist onga løtu í, at hetta skaddi sjálvsálit Maritu, sum hon í hesum døgum hevði so sera, sera hart brúk fyri - bæði so og so. Nakað eftir leggur Marita frá sær, og Javnaðarflokkurin fær formannin, ið so altráur hevur viljað sloppið framat.

Og nú byrjar ein heilt onnur og ófrættakend tíð í Javnaðarflokkinum. Hugsjónir floksins, strembanin móti javnrættindi fyri fólkið alt og vunnin rættindi verða sett til viks. Onkrir glottar vóru tó at hóma í longu andstøðuoyðimarkargongdini. Men tíðir skifta, eisini í politikki, og gongdin lagaði seg soleiðis, at formaðurin gjørdist løgmaður. - Og nú gekk skjótt niður á bakka.

Á ovastu rók høvdu vit ikki longur ein javnaðarhugsjónarmann, ið royndi at bera flokkinum uppi og í politikki sínum eisini royndi at finna onkrar gongdar javnaðarleiðir í samráðingarúrslitum.

Tvørturímóti!! Byrjað varð av álvara at selja av vunnum rættindum. Hugsjónin varð traðkað niður, og samhaldsfesti gjørdist brádliga ein býur í Ruslandi ella Kina, um tú vilt. Eftir ein landsfund, minnist meg rætt, á Svangaskarði, kemur formaðurin fram í fjølmiðlarnar og proklamerar at: Nú er stættarstríðið av!! - Lat meg endurtaka. Formaðurin í Føroya Javnaðarflokki kemur alment fram og boðar frá, at stættarstríðið er av.

Tá eitt stríð er liðugt, so hevur ein partur vunnið, og annar tapt. Í hugaheimi mínum er eingin ivi: Vinnararnir gjørdust Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og stórur partur av Tjóðveldi - ja, kapitalisman sum heild. - Men tapararnir gjørdust tey veiku í samfelagnum, tey ið verunliga hava fyri neyðini at verða lyft upp úr armóðslíknandi støðum. Tapararnir gjørdust eisini tey, ið trúðu og framvegis trúgva, at samfelagsins ágóði í stórstan mun skal javnast út soleiðis, at øll í hesum landi, ung eins og gomul, skulu eiga møguleika til eitt gott, ríkt og virðiligt lív.

Undirritaði trýr, at hetta framvegis er hugsjónarliga besta boð. Og væl veit eg, at tað eru so mong onnur, ið eisini halda tað sama. Og tí góðtaka vit so slett ikki, at vit hava tapt.

Undanfarnu formenn í Føroya Javnaðarflokki høvdu allir tað til felags, at teir nýttu orku at lyfta upp flokkin og brúktu tíð at stimbra javnaðarhugsjónina. Ótroyttiliga nýttu teir høvi at kunna um tað ótrúliga virði, ið hetta hevði fyri eitt gott samfelag. Vitjaðu út í lokalfeløgini og birtu lív í, brendu fyri sakini. Settu seg í samband við vanligar floksfelagar fyri at fregnast um, hvussu nú gekk.

Orsakið! men áskoðan mín er, at Javnaðarflokkurin hesi seinastu 12-13 árini hevur havt ein formann, sum í stóran mun hevur (mis) brúkt flokkin sum gísla fyri at hevja upp sín egna persón.

Og nú man vera upp á hægstu tíð, at vit javnaðarfólk taka okkum saman og siga: Nú er nokk - og væl tað!

Hanus Kamban nevnir í síni politisku viðmerking, at Hans Pauli Strøm er tann føroyski Auken. Auken stríddist alt sítt politiska lív fyri javnaðarhugsjónini. Og víst kundi tað verið ein gongd leið, tí - fyri at taka brot úr valfløgu javnaðarfloksins - HER MÁ VEND KOMA Í !!! Gódi Hanus. Hjartans tøkk fyri, at tú setti hol á búldin.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.